Búskapur og vinna:

## Danir arbeiða meiri

Hóast danski arbeiðsmarknaðurin hevur seks frívikur um árið, vísir ein kanning, at danir hava ongantíð arbeitt so nógv sum nú. BG-Bankin, sum hevur gjørt kanningina, sigur í sínari niðurstøðu, at í fjør arbeiddu danir í meðal 39 tímar meiri í fjør enn í 1995. Bankin leggur tó afturat, at hetta kemst partvíst av, at munandi fleiri kvinnur arbeiða fullan dag nú enn fyri sjey árum síðani. Í 1995 arbeiddu 64 prosent av kvinnunum fullan dag, men í fjør var parturin vaksin til 73 prosent. Kanningin sigur eisini, at 82 av øllum monnum á danska arbeiðsmarknaðinum arbeiða fullan dag.

Danska stjórnin sigur, at hon vil hava danir at arbeiða meiri, men í BG-Bankanum siga tey, at hetta fer ikki at lata seg gera, uttan so at skatturin verður lækkaður.

## Evran tekur dollaran

Gølan við Enron og nú við Tycho hevur gjørt, at nógvir amerikanarar hava mist álitið á landsins vinnulivi, og tað hevur fingið stórar avleiðingar fyri landsins búskap.

Seinastu tíðina er dollarin støðugt fallin í virði, og tað sama er at siga um nógv amerikansk virðisbrøv. Dollarin hevur leingi staðið seg væl í kappingini við felags evropeiska gjaldoyrað, evruna, men seinastu dagarnar er hann fallin so nógv, at nú er at kalla eingin munur á teimum báðum gjaldoyrunum. Búskaparfrøðingar vænta, at dollarin og evran fara at hava sama virði um stutta tíð.

Tað víkjandi dollaravirðið hevur havt við sær, at nógvir íleggjarar aftra seg við at gera íløgur. Tað hevur ikki bøtt um støðuna, at fleiri amerikanskar fyritøkur hava víst seg at hava verri úrslit enn hildið, og tað hevur gjørt, at virðið á nógvum partabrøvum í amerikanskum fyritøkum hevur verið fallandi seinastu dagarnar.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Søktu at høvuðsskrivstovuni hjá Arafat



*Ísraelskir serfrøðingar kanna leivdirnar av bilinum, sum tann sterka bumban í Megiddo var í*
*Mynd: Reuters*

**Ein av lívverjunum hjá palestinska leiðaranum doyði í ísraelska álopinum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Ísraelskir stríðsvognar lupu gjáramorgunin á høvuðsskrivstovuna hjá palestinska leiðaranum, Yasser Arafat, í býnum Ramallah á Vestara Áarbakka.

Ísraelska herleiðslan vildi ikki siga nakað um atsóknina, men talsmenn hjá Reyða Krossi søgdu, at minst seks palestinar vórðu særdir í atsókninni. Ein palestinskur talsmaður segði seinni, at ein av persónligu lívverjunum hjá Arafat doyði, tá ísraelsku stríðsvognarnir søktu at skrivstovuni hjá Arafat. Arafat sjálvur var óskaddur.

Sambært palestinska talsmanninum skutu ísraelsku stríðsvognarnir einar 30 granatir eftir bygninginum, sum Arafat hevur skrivstovu í. Sambært talsmanninum fekk tann parturin av bygninginum skaða, sum Arafat plagar at halda sínar tíðindafundir í.

Ísraelska átakið í Ramallah var hevnd fyri palestinsku bumbuatsóknina í ísraelska býnum Megiddu mikumorgunin, tá 16 fólk doyðu, og 37 vórðu særd.

Undan atsókini í Ramallah høvdu ísraelskir stríðsvognar og tyrlur søkt at málum í flóttafólka-leguni Jenin. Sagt verður, at maðurin, sum sprongdi ta sterku bumbuna í Megiddo, kom úr Jenin.

# Vandi fyri borgarakríggi í Madagaskar

**Fleiri samanbrestir hava verið í Madagaskar seinastu dagarnar, og fleiri bera ótta fyri, at rættiligt borgarakríggj kann bresta á**

MADAGASKAR
*Árni Joensen*

Síðani forsetavalið í Madagaskar í desember hevur stríð verið um, hvør veruliga vann valið. Tey báði valevnini, Marc Ravalomanana og Didier Ratsiraka, hava báðir sagt, at teir vunnu valið, og síðani hevur javnan verið ófriður millum viðhaldsmenn teirra.

Tað hevur serliga verið ófriðarligt í og uttan um høvuðsstaðin Antananarivo, og keldur siga, at meiri enn 30 brýr við høvuðsstaðin eru sprongdar í luftina. Samstundis er allur flutningur til og úr havnini steðgaður, og tí er býurin í veruleikanum avbyrgdur. Í høvuðsstaðnum búgva meiri enn ein millión fólk.

Ein danskur lækni, sum arbeiðir í Madagaskar, segði í gjár, at tíðindi eru farin at ganga um, at skip eru á veg til oynna við vápnum. Sum er er tað bara herurin, sum hevur vápn, men tíðindini kundu bent á, at stríðshugaðir bólkar eru í ferð við at útvega sær vápn.

Madagaskar er fyrrverandi franskt hjáland, og politiskir eygleiðarar siga, at Frakland er tað einasta landið, sum kann fáa teir báðar partarnar á oynni at binda frið. Frakland hevur framvegis stóra ávirkan á viðurskiftiuni í Madagaskar, men higartil hevur stjórnin í París verið varin við at leggja seg út í stríðið um forsetaembætið.

ES og serliga Týskland hava roynt at fáa partarnar til samráðingarborðið, men keldur í Madagaskar siga, at tað fer neyvan at henda nakað, fyrr enn franska stjórnin kemur uppí.

Úr Norðurlondum:

## Millumlendi við sjúkum drongi

Eitt russiskt flogfar millumlendi í Varnæsfloghavnini í Noregi mikukvøldið, tí eitt av ferðafólkunum mátti fáa læknahjálp.

Um hálvgum sjeytíðina boðaði russiski flogskiparin floghavnini frá, at ein smádrongur, sum var millum ferðafólkini, hevði fingið krampa, og at hann mátti undir læknahond. Flofgarið, sum var á veg úr Moskva til Toronto í Kanada, fekk alt fyri eitt lendingarloyvi og setti seg stutt eftir í Varnæs-floghavnini.

Smádrongurin varð fluttur á sjúkrahús í Tróndheimi, har læknarnir staðfestu, at hann hevði magakrampa. Hann varð útskrivaður í gjár.

## Dovnir næmingar

Ein kanning í Danmark vísir, at nógvir næmingar á donsku studentaskúlunum eru ov dovnir. Samstundis vísir kanningin, at lærararnir eru ov lagaligir.

Ein talsmaður hjá studentaskúlalærarunum viðgongur, at viðurskiftini á skúlunum eru broytt seinastu umleið 20 árini. Tá løgdu næmingarnir munandi størri dent á at gera tað, sum skúlin bað teir gera, tí annars var vandi fyri, at næmingarnir máttu fara úr skúlanum. Sambært talsmanninum hava næmingarnir als ikki somu virðing fyri skúlagongdini longur.

## Týðandi heilivágur

Fleiri fyritøkur í Evropa og aðrastaðni eru í ferð við at gera ein heilivág, sum skal basa teirri herviligu sjúkuni malaria, sum á hvørjum ári kostar meiri enn einari millión børnum í syðru helvt av Afrika lívið. Danski Serumstovnurin er nú komin so langt við sínum arbeiði, at tað verður eftir øllum at døma tann danski heilivágurin, sum verður tann fyrsti á marknaðinum.



# Jákup Oluf fingið nýtt lunga

**Í sløk tvey ár hevur hann bíðað, og loksins eydnaðist tað. Seint á kvøldi fyri júst trimum vikum síðani varð eitt lunga klárt til fuglfirðingin Jákup Oluf Breiðaskarð. Skurðviðgerðin eydnaðist væl og í dag verður hann útskrivaður av Ríkissjúkrahúsinum**

HEILSA
*Turið Kjølbro*

Hesa tíðina Jákup Oluf Breiðaskarð úr Fuglafirði hevur bíðað eftir nýggjum lunga, hevur hann búð á Sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, og har var hann eisini staddur hetta kvøldið, boð vóru eftir honum.

- Ein sjúkrasystir kom inn á kamarið hjá mær um 10 tíðina og spurdi meg um eg var klárur. Klárur til hvat, spurdi eg. Jú, eitt lunga var funnið til mín, greiðir Jákup Oluf frá.

Eingin fjáltur ella panikkur kom á hann. Skurðviðgerðin, sum var tíðliga morgunin eftir, eydnaðist fyrimyndarliga, og longu í dag verður Jákup Oluf útskrivaður av Ríkissjúkrahúsinum. Í síðstu viku var ein frástoyting, men hetta er sum skilst púra vanligt. Næstu fýra-fimm mánaðirnar verður hann verandi á Hotel Tórshavn fyri at tryggja sær, at hann fær góða hvíld og kanningar.

- Eg vil vera vissur í, at alt er í lagi, áðrenn eg fari heim til Føroya aftur, sigur Jákup Oluf Breiðaskarð.

**Lungasystkin**

Hvørjum lungað er frá, veit Jákup Oluf ikki, og hann vil heldur ikki vita tað. Tað er høgra lungað, sum er útskift, hitt virkar so dánt, sum ein hjálpimotorur, sum Jákup Oluf tekur til. Vinstra lungað á tí persóninum, Jákup Oluf hevur fingið lungað frá, var latið eini kvinnu, sum varð skurðviðgjørd samstundis sum hann.

- Eg vaknaði eftir skurðviðgerðina upp við síðuna av eini danskari kvinnu, sum hevur fingið hitt lungað, so vit eru sokallað lungasystkin. Hjá henni hevur eisini gingið væl, sigur Jákup Oluf.

Nú byrjar eitt nýtt lív. Hann er sloppin av við allar slangur, sum hava givið honum ilt døgnið runt. Og tað er sjálvsagt ein stórur lætti.

**Ein dag í senn**

Fyri lítlum ári var eitt lunga funnið til hann. Jákup Oluf var klárur at fara undir skurðviðgerð, tá ið læknarnir funnu út av, at hann hevði bruna í húðini og tí ikki kundi skurðviðgerast. Hetta kom sum vera man sera dátt við hjá Jákup Oluf, og tað er helst hendan upplivingin, sum hevur verið í bakhøvdinum hetta kvøldið fyri trimum vikum síðani, tá ið aftur boð vóru eftir honum.

Hvat Jákup Oluf fer at takast við, tá ið hann kemur aftur til Føroya seinni í ár, hevur hann ikki gjørt av. Hann tekur ein dag í senn. Aftur á sjógvin sleppur hann ikki at arbeiða, hevur hann fingið greitt at vita.

- Okkurt verður til mín at gera, eri eg ivaleysur í, sigur Jákup Oluf Breiðaskarð.

Tað var í mars fyri góðum tveimum árum síðani, at Jákup Oluf, sum tá var 32 ára gamal, gjørdist sjúkur. Jákup Oluf hevur meginpartin av sínum arbeiðslívi verið sjómaður. Á eini frívakt vaknaði hann knappliga eina náttina við fepri og hevði ilt fyri lungunum. Sum tíðin gekk orkaði hann minni og røntgenmynd vísti, at eitthvørt var á lungunum. Hvat, vistu læknarnir ikki. Ikki fyrr enn Jákup Oluf kom á Ríkissjúkrahúsið eftir at hava ligið hálvan annan mánaða á Landssjúkrahúsinum, funnu læknar út av, at hann hevur lungnafibrosu. Lunguni verða spakuliga oyðiløgd. Ístaðin fyri at gera bindivev, gera lunguni arrvev. Helst er sjúkan ikomin, tí hann hevur andað okkurt vandamikið í seg, okkurt eitur av onkrum slag. Ongin viðgerð er fyri lungnafibrosu. Einasti møguleikin er at fáa nýtt lunga.



*Jákup Oluf tveir tímar eftir skurðviðgerðina*

# Ov fá fólk til norðoyastevnukonsertina

**Eini 150 fólk vóru til útikonsertina í Klaksvík á norðoyastevnu**

TÓNLEIKUR
*pop.fo*

Seks bólkar spældu á útikonsert, sum tónleikafelagið Sjey00 skipaði fyri at norðoyastevnu. Konsertin varð hildin í skúlagarðinum á Ziskatrøð fríggjakvøldið, og eini 150 fólk vóru til konsertina.

Norðoyastevnuveðrið gjørdu fortreð fyri nógv tiltøk, og útikonsertin merkti eftir øllum at døma eisini eitt sindur til hesar avleiðingar. Kanska var ein trupulleiki eisini, at skráin var í so einstáttað við líknandi bólkum.

Bólkarnir, sum spældu á konsertini, vóru Stinkfist, Iris, No Connection, Gulli, Krit og Side Effect.

# Brandur fær fjepparabrøv úr Danmark

**Eftir framførsluna í barnasendingini hjá Bubber, hevur Brandur Enni hoyrt frá fleiri fjepparum í Danmark**

TÓNLEIKUR
*pop.fo*

Brandur Enni gjørdi eftir øllum at døma vart við seg, tá hann var við í sendingini Snurre Snups Søndagsklub, sum kendi danski verturin Bubber skipar fyri.

Brandur framførdi ein sang og tosaði við Bubber, og tað kom evnaríki føroyingurin væl frá.

Eftir at sendingin varð víst í donskum sjónvarpi, hevur Brandur fingið fleiri brøv sendandi frá fjepparum í Danmark, sum sóu hansara framførslu á TV2 og sum halda, at hann stóð seg sera væl.